UTTAN ÚR HEIMI



*Hendir einki skjótt, endar kreppan í Darfur sum ein sonn vanlukka, og so er ilt at ímynda sær úrslitið, sigur ST*

*Mynd: Reuters*

# Heimsins ringasta kreppa

**Kreppan í Darfur er tann ringasta í heiminum, og vaknar altjóða samfelagið ikki, verður hon uppaftur verri**

KREPPA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Flóttafólkakommiserurin hjá ST, Antonio Guterres, er ikki í iva:

– Kreppan í sudanska landspartinum Darfur álvarsamasta í heiminum í løtuni, og leggur altjóða samfelagið ikki trýst á teir stríðandi partarnar fyri at fáa teir at binda frið, kann kreppan enda sum ein sonn vanlukka, og tá er ilt at ímynda sær, hvat kann henda.

Á einum fundi við ST-trygdarráðið fyri nøkrum døgum síðani segði Antonio Guterres, at støðan í Darfur er versnað hendan seinasta mánaðin, og at hvønn dag eru hjálparfólkini vitni til, at flóttafólkalegur verða álopnar og oyðilagdar, og at ágangurin ímóti kvinnunum økist í hvørjum.

Kreppan í Datfur byrjaði fyri trimum árum síðani við uppreistri ímóti teimum sudansku myndugleikunum. Uppreistrarmenninir krevja størri sjálvræði, men stjórnin svaraði kravinum við hermegi. Úrslitið er, at sivilfólk í hópatali eru myrd, og nógvar bygdir eru lagdar í oyði. Meiri enn tvær milliónir fólk eru flýdd, og tey, sum eru eftir, eru støðugt fyri álopi frá vápnaðum harkaliðum, sum óalment fáa stuðul frá stjórnarherinum.

Í einari nýggjari frágreiðing hjá amerikonsku stjórnini stendur, at royndirnar at fáa frið í Darfur eru at kalla farnar fyri bakka, og at harðskapurin økist dag frá degi. Í fjør lovaði sudanska stjórnin at bøta um mannarættindini í øllum landinum, men sambært ST er lítið og einki hent.

Afrikanski Eindarfelagsskapurin hevur í løtuni 6.800 hermenn í Darfur, men teir hava ikki megnað at steðga óskilinum. Tað hevur verið upp á tal at senda ST-hermenn til Darfur, men enn er eingin avgerð tikin um tað.

# Játtar sekan sekan í eldsbruna

**97 fólk doyðu, tá fýrverk festi í ein náttklubba í Rhode Island í USA fyri tveimum árum síðani. Maðurin, sum skipaði fyri, hevur nú játtað seg sekan**

ELDSBRUNI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein av teimum stóru rockbólkunum, Great White, hevði konsert í náttklubbanum The Station í amerikanska býnum West Warwick í februar í 2003. Fýrverk var ein náttúrligur partur av konsertini, men alt í einum festi fýrverkið í hølini, og eftir lítlari løtu stóð alt í ljósum loga.

Tá bjargingarliðini vóru liðug at leita í húsaleivdunum, høvdu 97 fólk latið lív, og umleið 200 onnur høvdu fingið skaða. Millum teirra, sum doyðu, var guitarleikarin í Great White, Ty Longley.

Vanlukkan var tann fjórðistørsta av sínum slagi í USA nakrantíð, og hesi bæði árini síðani hevur løgreglan arbeitt við at kanna, hvør hevði ábyrgdina. Nú hevur Daniel Bierchele, sum skipaði fyri konsertini, játtað seg sekan í óviljaðum manndrápi, sum hann kann fáa upp í 10 ára fongsul fyri.

Daniel Bierchele heldur tó uppá, at hann hevði fingið loyvi til at brúka fýrverk í náttklubbanum, men tað avsanna eigararnir.

Lesið Sosialin - so eru tit við

## Granskaragøla í Svøríki

Seinastu tíðina er komið fram, at granskarar í USA, Suðurkorea og Noregi hava snýtt í sínum kanningararbeiði, og nú hendir tað sama í Svøríki.

Dagens Nyheter skrivar, at Thomas Lundeberg, ið hevur arbeitt sum granskari á Karolinska Instituttet í Stockholm, hevur skrivað drúgvar frágreiðingar um kanningar, sum hann ongantíð hevur gjørt, og at hann harumframt hevur brúkt brot úr frágreiðingum, sum aðrir granskarar hava skrivað. Men tað var eftir øllum at døma eingin, sum varnaðist tað, og frágreiðingar hansara fingu eisini pláss í tí viðurkenda tíðaritinum European Journal of Neuroscience.

Tað eru bara fjúrtan dagar, síðani ein norskur granskari bleiv avdúkaður í at hava skrivað frágreiðingar um krabbameinskanningar, sum hann segði seg hava gjørt. Í fjør varð ein granskari í Suðurkorea avdúkaður sum falsari, og fyri tveimum árum síðani varð avdúkað, at einki hald var í greinum, sum ein amerikanskur granskari hevði skrivað.

Dagens Nyheter skrivar, at tað eigur ikki at koma óvart á nakran, at tað sama nú er hent í Svøríki. Blaðið vísir á, at kappingin er so hørð, at hon kann fáa fleiri at fara um mark.

## Verða ikki sendir heim

Fýra bretskir diplomatar í Moskva, sum í síðsta mánað vórðu lagdir undir at hava njósnast, verða ikki koyrdir úr Russlandi. Tað segði Vladimir Putin, forseti, á einum tíðindafundi í gjár.

– Tað er líka frægt, at teir verða verandi her, tí so hava vit eftirlit við teimum. Sambandið ímillum Russland og Bretland er so gott, at tað skal meiri enn hetta til at oyðileggja tað, segði russiski forsetin.

Russar vilja vera við, at teir fýra diplomatarnir á bretsku sendistovuni í Moskva hava njósnast fyri bretsku fregnartænastuna MI6, og at teir gava givið russiskum mannarættindafelagsskapum pengar.

## Norðmenn skulu røra seg

Heilsukanningar í Noregi vísa, at norskir menn viga í meðal nīggju kilo meiri nú enn fyri 40 árum síðani. Samstundis vísa aðrar kanningar, at børn í 9 til 15 ára aldri viga trý kilo meiri nú enn fyri 25 árum síðani, og at fimta hvørt barn í aldrinum 8 til 12 ár vigar ov nógv. Orsøkin er millum annað, at børn og vaksin røra seg nógv minni nú enn fyrr. Eitt nú sita norsk børn still í 40 tímar hvørja viku, og tá eru tímarnir í skúlanum ikki taldir við. Hatafturat kemur, at 40 prosent av børnunum verða koyrd í skúla.

Men nú skal okkurt gerast. Stjórnin hevur gjørt av, at børnini skulu røra seg meiri í skúlanum, men tey vaksnu eiga eisini at taka sær um reiggj, sigur Sylvia Brustad, heilsumálaráðharri. Hon sigur við Aftenposten, at stjórnin fer at eggja arbeiðsgevarum til at geva sínum starvsfólkum møguleikar at røra seg meiri í tí dagliga arbeiðinum.

Men tað týdningarmesta er at fáa børnini og tey ungu at røra seg meiri. Sylvia Brustad sigur, at verður einki gjørt, endar tað helst við, at børnini fara at liva stytri enn foreldrini, og tað er ikki hent fyrr.

## Lumpaðu Chirac

Nú ein dagin ringdi telefonin á skrivstovuborðinum hjá franska forsetanum, Jacques Chirac. Forsetin hevði fingið at vita, at nývaldi kanadiski forsætisráðharrin, Stephen Harper, var í hinum endanum, og sum siður er, kvikaði forsetin sær at ynskja hinum tillukku við valinum. Tann fremmandi takkaði, men segði seg vera misnøgdan við ta umrøðu, sum hann hevði fingið í fronskum bløðum undan valinum.

– Ájú, soleiðis er, men vit kunnu ikki forða bløðunum at skriva tað, tey hava hug til. Vit hava jú pressufrælsi, skilja tygum, svaraði Chirac.

Maðurin í hinum endanum greiddi nú forsetanum frá, at hann æt ikki Stephen Harper, men at talan var um eina skemtisending hjá einari kanadiskari útvarpsstøð.

– Ná, sama ger. Men tað týdningarmesta er, at mær dámar væl Kanada og ta nýggju konservativu stjórnina hjá tykkum, svaraði tann 73 ára gamli forsetin sambært BBC.